# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Venjingarferðirnar hjá russiska flogvápninum eru ein royna at spæla við vøddunum*
*(amerikanskur talsmaður)*



*241 ferðafólk vóru í tokinum millum Moskva og St. Pætursborg, tá tað fór útav*

## Tað var yvirgangur

**Russisku myndugleikarnir eru sannførdir um, at tokvanlukkan norðan fyri Moskva í gjár var yvirgangur**

- Tokið fór av jarnbreytini, tí ein heimagjørd bumba brast á breytini. Tí verður tilburðurin kannaður eftir lógargreinini um yvirgang, segði statsadvokaturin Sergei Bednichenko við russiska sjónvarpið í gjárkvøldið.

Umleið 60 fólk fingu skaða, tá ferðamannatokið millum Moskva og St. Pætursborg fór av breytini einar 500 kilometrar norðan fyri Moskva. 25 teirra fingu so álvarssamar løstir, at tey máttu á sjúkrahús.

Russisku myndugleikarnir siga, at tokførarin hoyrdi tveir brestir, beint áðrenn tokið fór útav. Ferðafólk reiddu frá, at tey hoyrdu ein brest, og at tað var ramur brunaroykur í fleiri tokvognum.

Sambært sjónvarpinum hevur løgreglan eingi spor at ganga eftir. Kekenskir uppreistrarmenn hava fyrr skipað fyri atsóknum í Russlandi, men teir hava ikki gjørt um seg í meiri enn eitt ár nú.

## Hon var tað elsta

**Yone Minagawa var 114 ára gomul og heimsins elsta fólk**

Elsta fólk í heiminum, japanska Yoni Minagawa, er deyð av elli á einum røktarheimi í býnum Fakuschi har suðuri í Japan. Hon var 114 ára gomul. Sambært skjølum var Yoni fødd tann 4. januar í 1893, og fyri einum góðum hálvum ári síðani bleiv staðfest, at hon var elsta fólk í heiminum.

Tað er rættiliga vanligt, at fólk í Japan liva leingi, og japanskir læknar siga, at ein orsøk er í hvussu er, at japanar eta nógvan fisk og nógv rís. Fyri tveimum árum síðani kom meðallivialdurin hjá kvinnum í Japan upp í 85 ár, sum er tað mesta í heiminum. Japanskir menn liva í meðal 79 ár. Sambært japanska fólkayvirlitinum eru næstan 28.000 japanar eldri enn 100 ár.

Nú Yoni Minagawa er deyð, er Edna Parker í Indiana í USA heimsins elsta fólk. Hon er fødd 20. apríl í 1893 og er sostatt eisini 114 ára gomul.



*Yoni Minagawa átti fýra synir og eina dóttir*

## Russisk bumbuflogfør nærri og nærri USA

Russisk bumbuflogfør, sum eru á venjingarferð, flúgva javnan tætt fram við amerikanska markinum. Amerikanskir embætismenn halda, at russar vilja fegnir vísa, at teir skulu takast í álvara sum hernaðarveldi. Embætismenninir halda eisini, at russisku venjingarferðirnar hava fingið ein serligan týdning, eftir at USA gjørdi av at fáa sær eina rakettverjuskipan. Í Bretlandi og Noregi hava myndugleikarnir eisini varnast fleiri russisk venjingarflogfør við markið í seinastuni.

**STUTT SAGT**

### Roynir aftur

Í Turkalandi hevur stjónarflokkurin AK gjørt av at stilla uttanríkisráðharran, Abdullah Gül upp til forsetavalið, sum verður seinni í mánaðinum. Tingið skal atkvøða tríggjar ferðir um forsetan, 20. , 24. og 28. august. Andstøðan hevur fyrr steðgað royndunum hjá AK at velja uttanríkisráðharran til forseta, og andstøðan sigur, at hon fer heldur ikki at atkvøða fyri honum hesaferð. Turksiki herurin vil heldur ikki hava hann til forseta.

### USA á pólin

USA ætlar sær ikki at sita hendur í favn, nú fleiri lond gera vart við, at tey kanna sær ræðisrættin yvir økinum kring Norðpólin. Tí hava amerikonsku myndugleikarnir sent eitt lið av granskarum norður til póløkið at kanna, um havbotnurin undir pólinum er beinleiðis framhald av landgrunninum við Alaska. Umframt USA hava Kanada, Noreg, Danmark og ikki minst Russland verið virkin í póløkinum í seinastuni.

### Vatnflóð í Norðurkorea

Tað hevur regnað óvanliga illa nógvastaðni í Norðurkorea í seinastuni, og tað hevur elvt til vatnflóð í pørtum av landinum. Myndugleikarnir søgdu í gjár, at fleiri hundrað fólk eru deyð ella ikki komin afturíaftur, og at meiri enn 30.000 hús eru oyðiløgd. Harafturat hevur regnið oyðilagt jarnbreytir og brýr, og stór landbúnaðarøki standa undir í vatni. Í fjør var eisini vatnflóð í Norðurkorea, og tá bað landið Suðurkorea um mat og aðra hjálp.